Ítróttar
# Sosialurin
Nr. 75 • mikudagur • 19. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Olympiski forsetin vil halda Føroyar uttanfyri

**Forsetin fyri Olympisku nevndina hevur sent Ítróttarsambandi Føroya skriv, har hann boðar frá, at Føroyar ikki kunnu fáa limaskap í IOC, fyrr enn Føroyar eru blivnar stjálvstøðugt land. ÍSF-forsetin ætlar sær als ikki at góðtaka svarið**




OLYMPISKIR LEIKIR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ítróttarsamband Føroya fekk nú um dagarnar skriv frá forsetanum í International Olympic Committee, Jaques Rogge, har hann avvísir føroysku umsóknini um limaskap í Olympisku leikunum.

Jaques Rogge sigur í skrivinum, at Føroyar og Grønland kunnu ikki sleppa við til Olympisku leikirnar, fyri enn tey eru blivin sjálvstøðug lond.

– Hetta skrivið tykist verða heldur løgið, tí vit hava als ikki biðið um nakað úttalilsi frá Jaques Rogge. Vit hava umvegis danska mentamálaráðharran biðið um ein fund við IOC um okkara umsókn um limaskap, men nú fáa vit alt í einum hetta skrivið frá honum, sigur Heðin Mortensen, forseti í ÍSF.

– Eg ælti mær ikki at góðtaka hetta svarið, og vit fara at viðgera skrivið frá Rogge á næsta stjórnarfundi í ÍSF, sigur hann.

### Vilja ikki flokkast saman við Grønlandi

Føroyar sendu fyrst í áttatiárunum umsókn um limaskap til IOC. Hetta var áðrenn felagsskapurin staðfesti, at bert sjálvstøðug lond sleppa við til Olympisku leikirnar. Síðani hava Føroyar tvíhildið um hesa umsókn, sum ongantíð er endaliga svarað øll árini síðani.

Seinastu tíðina hevur ÍSF roynt at skunda undir viðgerðina av umsóknini, og umvegis danska mentamálaráðið hevur ÍSF roynt at fingið fund í lag við leiðsluna í IOC.

Føroyar hava eisini staðiliga viðmerkt, at tær vilja ikki flokkast saman við Grønlandi í hesum samanhanginum, tí Føroyar eru í heilt aðrari støðu enn Grønland.

– Okkara umsókn er frá fyrst í 80'unum, og vit hava fingið limaskap í øllum øðrum aljtóða ítróttarfelagsskapum síðani. Tað er bara IOC, sum ikki hevur givð okkum limaskap enn, sigur Heðin Mortensen.

*Ovasti leiðarin fyri Olympisku leikirnar sigur, at Føroyar kunnu ikki sleppa við til leikirnar, fyrr enn Føroyar eru blivnar sjálvstøðugt land. Harvið eru ikki útlit fyri, at føroysk ítróttarfólk kunnu skifta Oyggjaleikirnar út við Olympiskar leikir, men ÍSF ætlar ikki at gevast á hondum*

### Stríðið heldur fram

Hóast ovasti leiðarin fyri IOC nú hevur givið sína hugsan til kennar um føroyska limaskapin í Olympisku leikunum, so fer ÍSF-forsetin ikki at gevast á hondum.

– Vit hava ikki biðið um persónligu meiningina hjá Jaques Rogge, og tað er umráðandi at leggja dent á, at tað er ikki IOC-felagsskapurin formliga, sum við hesum avvísir okkara umsókn. Vit hava ongantíð fingið eitt nei ella eitt ja frá IOC-felagsskapinum til okkara umsókn, sigur Heðin Mortensen.

– Eg haldi, at Jaques Rogge misskilir fullkomiliga føroysku støðuna, og tað vilja vit royna at greiða honum frá. Vit fara at arbeiða víðari fyri at fáa ein formligan fund við IOC-leiðsluna um okkara umsókn, sigur hann.

## Danir vilja hjálpa Føroyum

Danmarks Idræts Forbund (DIF) er sinnað at hjálpa føroyskum og donskum ítróttarfólkum við til Olympisku leikirnar, skrivar TV2.

DIF hevur júst gjørt eina eftirmeting av Olympisku vetrarleikunum í Torino, og felagsskapurin er sinnaður at lurta eftir sjónarmiðum úr Føroyum og Grønlandi. Ætlanin er, at DIF nú fer at taka fundir við føroyskar og grønlendskar myndugleikar um málið.

– Tað skal viðgerast, um vit í størri mun skulu lata undantøk til eitt nú føroysk og grønlendsk ítróttarfólk, sigur Jesper Frigast Larsen, elituleiðari í DIF, við TV2.

## SÍF rundar 100

Tað eru í ár liðin 100 ár, síðan Sandavágs Ítróttarfelag, SÍF, varð stovnað. Felagið hátíðarheldur føðingardagin við ymsum tiltøkum gjøgnum árið. Tað fyrsta verður leygardagin 22. apríl.

Tá skipar Sandavágs Ítróttarfelag fyri serligum ítróttardegi á og kring ítróttarøkið á Valloyruni. Á skránni eru eldri og nýggjari spøl, eins og ítróttarkappingar verða millum eldri sum yngri ítróttarfólk. Fyrireikararnir leggja dent á, at tiltakið er alment, bæði bygdar- og avbygdarfólk eru hjartaliga vælkomin at luttaka ella bara hyggja at og hugna sær.

Lagt verður fyri við morgunmati fyrrapartin, og síðan byrja kappingar og spøl og halda á til út á seinnapartin.

### Nógv á skránni

SÍF ger nógv burtur úr degnum leygardagin, og skráin fyri tiltakið er hendan:

**Kl. 10:00:** SÍF bjóðar morgunmat í SÍF-húsinum – øll eru hjartaliga vælkomin!
**Kl. 11:00:** Ítróttarfólk frá fimti- og sekstiárunum ganga skrúgongu frá SÍF-húsinum og umvegis. Gamlaveg oman á hondbóltsvøllin
**Kl. 11:30:** Hondbóltsdystur millum Søljugentur frá fimti- og sekstiárunum
**Kl. 12:30:** Fótbóltsdystur millum SÍF leikarar frá fimti- og sekstiárunum
**Kl. 13:30:** Ymiskir ítróttar- og frítíðaraktivitetir fyri øll á Valloyruni, m.a.

- gjørðarrenning
- kasta kongar
- lakka paradís
- lofta við bóltum
- hoppa band og elastik
- rógva við rógvimaskinu
- kasta og skjóta í mál (ferðmátari mátar skotstyrkina)
- Petanque (kúluspæl)
- "Melda kríggj"
- "Hávurin kemur"

**Kl. 15:30:** SÍF tiltakið endar




# GITIÐ LEIKARAN

**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.



Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS